# Ung list í Leikalund



*Mannakroppurin er eitt afturvendandi myndevni á listaframsýningini hjá Jórun Høgnesen í Leikalund*

Fríggjadagin 23. juli lat nýggj listaframsýning upp í Leikalund. Hesuferð er tað unga listakvinnan Jórun Høgnesen, sum sýnir fram.

Hóast Jórun, sum er ættað av Norðoyri, bert er 21 ára gomul, hevur hon longu í nøkur ár fingist við bæði málningalist, glaslist og leirlist. Tað verða eisini hesi, sum verða sýnd fram í Leikalund. Hon hevur fyrr verið við á framsýningum, eitt nú á Norðoyastevnuframsýning og eisini í vár, tá Norðoya Sparikassi hevði stóra tiltakið "Fram í ljósið".

Við á framsýningini í Leikalund eru umleið 15 nýggir akrylmálningar umframt glaslutir og leirlutir.

Myndevnini eru mest persónslýsingar.

Myndirnar og hinir lutirnir eru til sølu og eru at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadag til hósdag frá 10 til 17:30, fríggjadag frá 10 til 19 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi fram til 5. august.

Framsýningin, íð tekur við aftaná framsýningina hjá Jóruni, verður listaframsýning hjá Olivuri við Neyst. Hendan framsýningin er í samband við Listastevnuna 2004.

*-ave-*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi og fyrrapartin regn, men út á seinnapartin yvirhøvui turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sólglottar, men okkurt ælið leygardagin. Hitin millum 13 og 17 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 21 |
| Tromsø | 19 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 28 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 21 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 12 |
| New York | 22 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 988 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týskvøldið.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst á 44N-30V fer móti íslandi og hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/07 kl. 06[00]–26/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 25/07 kl. 06[00]–26/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 62,0 mm

GEVIÐ BLÓÐ

Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter
30. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. juli | 03.12 | 15.38 | 02.12 | 14.38 | 02.27 | 14.53 | 05.12 | 17.38 | 06.12 | 18.38 | 01.27 | 13.53 | 00.27 | 12.53 | 03.27 | 15.53 | 04.27 | 16.53 | 02.57 | 15.23 | 04.12 | 16.38 |
| 28. juli | 04.04 | 16.32 | 03.04 | 15.32 | 03.19 | 15.47 | 06.04 | 18.32 | 07.04 | 19.32 | 02.19 | 14.47 | 01.19 | 13.47 | 04.19 | 16.47 | 05.19 | 17.47 | 03.49 | 16.17 | 05.04 | 17.32 |
| 29. juli | 05.00 | 17.29 | 04.00 | 16.29 | 04.15 | 16.44 | 07.00 | 19.29 | 08.00 | 20.29 | 03.15 | 15.44 | 02.15 | 14.44 | 05.15 | 17.44 | 06.15 | 18.44 | 04.45 | 17.14 | 06.00 | 18.29 |
| 30. juli | 05.59 | 18.28 | 04.59 | 17.28 | 05.14 | 17.43 | 07.59 | 20.28 | 08.59 | 21.28 | 04.14 | 16.43 | 03.14 | 15.43 | 06.14 | 18.43 | 07.14 | 19.43 | 05.44 | 18.13 | 06.59 | 19.28 |
| 31. juli | 06.58 | 19.26 | 05.58 | 18.26 | 06.13 | 18.41 | 08.58 | 21.26 | 09.58 | 22.26 | 05.13 | 17.41 | 04.13 | 16.41 | 07.13 | 19.41 | 08.13 | 20.41 | 06.43 | 19.11 | 07.58 | 20.26 |

5 707265 100029 >